# NSÍ-GÍ

**3-2 (0-1)**

0-1: Sámal Joensen 40
1-1: Gert Langgaard 65
2-1: Óli Hansen 68
2-2: Sámal Joensen 71
3-2: Sjúrður Jacobsen (br.) 79

**Dómari:** Oddmar Andreasen (HB)

**NSÍ**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 2-(-6) | 1-0 | Jens Martin Knudsen (liðform.) |
| 2 | 2-0 | 0-0 | Arnfinn Langgaard |
| 6 | 2-0 | 0-0 | Ian Højgaard |
| 8 | 2-0 | 1-0 | Jónstein Petersen |
| 9 | 2-0 | 0-0 | Sonni L. Petersen |
| (3) | 1-0 | 0-0 | (Ken Nónklett, 83) |
| 10 | 2-1 | 0-0 | Óli Hansen |
| 11 | 1-0 | 0-0 | Eddie Mikkelsen |
| (7) | 2-1 | 0-0 | (Gert Langgaard, 49) |
| 12 | 2-0 | 1-0 | Helgi L. Petersen |
| 14 | 2-0 | 0-0 | Pól Thorsteinsson |
| 15 | 2-0 | 2-0 | Brynjolvur Nielsen |
| 18 | 2-1 | 0-0 | Sjúrður Jacobsen |

**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**GK:** Brynjolvur Nielsen 33, Jónstein Petersen 43, Helgi L. Petersen 89

| | | |
|---|---|---|
| * 1-0 | 0-0 | Djóni N. Joensen |
| * 1-0 | 0-0 | Mortan Hansen |
| * 1-0 | 0-0 | Kári Hansen |

**GÍ**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 2-(-4) | 0-0 | Hallur Hansen |
| 2 | 2-0 | 2-0 | Bartal Eliasen |
| 4 | 2-0 | 0-0 | Leivur Hansen |
| 6 | 2-0 | 1-0 | Áslakur R. Petersen |
| 7 | 2-0 | 0-0 | Magni Jarnskor |
| 8 | 2-0 | 0-0 | Krzystof Popczynski |
| 9 | 2-1 | 1-0 | Zdzislaw Janik |
| (18) | 2-0 | 0-0 | (Jóan Petur Olsen, 46) |
| 10 | 2-2 | 2-0 | Sámal Joensen (liðform.) |
| 11 | 1-0 | 0-0 | Súni Fríði Johannesen |
| 12 | 2-0 | 0-0 | Magnus Skoralíð |
| 14 | 2-0 | 0-0 | Hans Pauli Petersen |

**Venjari:** Jóhan Nielsen
**GK:** Sámal Joensen 22, Bartal Eliasen 27, Áslakur R. Petersen 83

| | | |
|---|---|---|
| * 1-0 | 0-0 | Poul Henning Jacobsen |
| * 1-0 | 0-0 | Poul Rói Poulsen |

# TB-B68

**1-4 (1-1)**

1-0: Dan Mortensen 17
1-1: Andreas Nygaard 44
1-2: sjálvmál (Andras Nolsøe) 56
1-3: Øssur Hansen 85
1-4: Øssur Hansen 86

**Dómari:** Suni Johansen (SÍF)

**TB**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 2-(-4) | 0-0 | Lars Müller |
| 2 | 2-0 | 1-0 | Tórur Mortensen |
| 4 | 2-0 | 0-0 | Nebosja Urtajl |
| 5 | 2-0 | 1-0 | Vladimir Matijivic |
| 6 | 2-0 | 0-0 | Zoran Mancic |
| 7 | 2-1 | 1-0 | Einar Petersen |
| 8 | 2-0 | 0-0 | Rasmus Nolsøe |
| 9 | 2-1 | 1-0 | Dan Mortensen (liðform.) |
| 10 | 2-0 | 0-0 | Bárður Dimon |
| (11) | 2-0 | 0-0 | (Vagnur Nolsøe, 86) |
| 14 | 2-0 | 0-0 | Andras Nolsøe |
| (13) | 2-0 | 0-0 | (Allan Michelsen, 79) |
| 15 | 2-0 | 0-0 | Aleksandar Radosavljevic |

**Venjari:** Zoran Mancic
**GK:** Einar Petersen 47

**B68**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 2-(-2) | 0-0 | Michal Kokoszanek |
| 2 | 2-0 | 0-0 | Jahn Ingi Petersen |
| 3 | 2-1 | 0-0 | Andreas Nygaard |
| (9) | 2-0 | 0-0 | (»Marcello« Marcelino, 85) |
| 4 | 2-0 | 0-0 | Hans Fróði Hansen |
| 5 | 2-0 | 1-0 | »Marlon« Jorge |
| (16) | 2-0 | 0-0 | (Jan Petersen, 74) |
| 6 | 2-0 | 0-0 | John Heri Dam |
| 7 | 2-3 | 1-0 | Øssur Hansen |
| (13) | 1-0 | 0-0 | (Øssur Jacobsen, 88) |
| 10 | 2-0 | 1-0 | Fróði Benjaminsen (liðform.) |
| 11 | 2-0 | 0-0 | Arnold Joensen |
| 17 | 2-0 | 0-0 | »Messias« Perreira |
| 18 | 2-0 | 0-0 | Oleif Joensen |

**Venjari:** Frank Skytte
**GK:** einki
* 1 sjálvmál (TB)

## Málskjúttar:

| | | |
|---|---|---|
| Øssur Hansen | B68 | 3 |
| John Petersen | B36 | 2 |
| Sámal Joensen | GÍ | 2 |
| Uni Arge | HB | 2 |
| Andrew av Fløtum | HB | 2 (1 br.) |
| Jón Rói Jacobsen | HB | 2 |
| Jákup á Borg | B36 | 1 |
| Egil Zachariassen | B36 | 1 |
| Andreas Nygaard | B68 | 1 |
| Andrzej Pacek | EB/Str. | 1 |
| Zdzislaw Janik | GÍ | 1 |
| Hans á Lag | HB | 1 |
| Rúni Nolsøe | HB | 1 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 1 |
| Kurt Mørkøre | KÍ | 1 |
| Ove Nysted | KÍ | 1 |
| Óli Hansen | NSÍ | 1 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 1 (1 br.) |
| Gert Langgaard | NSÍ | 1 |
| Pauli Hansen | Skála | 1 |
| Dan Mortensen | TB | 1 |
| Einar Petersen | TB | 1 |
| Nenad Zivanovic | VB | 1 |
| sjálvmál hjá TB | B68 | 1 |

adidas

# Rosenborg setti Molde upp á pláss

**Heldur ikki hesa ferð var avrikið hjá manninum, sum forðar Jákupi Mikkelsen at spæla á besta liðnum, nakað serligt**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Molde var í Tróndheimi hóskvøldið. Heimaliðið, Rosenborg, sum ikki hevði verið sannførandi í fyrstu umførunum, var eirindarleyst. Frá 29. og til 42. minutti skoraðu teir trý mál. Molde megnaði ikki at svara aftur. Tískil vann Rosenborg 3–0. Tað var uppiborið. Harald Brattbakk skoraði triðja málið. Hetta var 124. málið, sum hann hevur skorað fyri Rosenborg. Tað er nýtt met. Harald Brattbakk hevur í fleiri umførum spælt við Rosenborg.

Rosenborg var hóskvøldið gingið frá 4–3–3 spælskipanini, sum teir so leingi hava hildið seg til. Teir høvdu hesa ferð ein spælara aftanfyri tveir teir fremstu. Molde verjan hevði sera ilt við at finna út av broytingini. Rosenborg hevði nógvar møguleikar, og teir raktu fleiri ferðir í træverkið.

Jákup Mikkelsen var heldur ikki hesa ferð í Molde málinum. Gunde Bengtsson hevði aftur hesa ferð tikið Eddie Gustafsson framum. Heldur ikki hesa ferð fær hann nakað serligt skoðsmál fyri avrikið. Spurningurin er so, hvussu leingi venjarin velur at hava sama málverjan millum stólparnar og nær, hann fer at geva Jákupi Mikkelsen møguleikan. Venjarin og norskir fjølmiðlar hava fyrr í vár staðfest, at Molde er tað liðið, sum hevur tveir teir javnbestu málverjarnar.

Áður hevur verið nevnt, at Jákup Mikkelsen fór at fáa møguleikan, tá Eddie Gustafsson fór við svenska landsliðnum til HM kappingina í Japan og Suðurkorea. Nú er svenska ferðalagið til HM endaspælið úttikið, og Eddie Gustafsson er ikki millum teir kosnu. Tað er FCK málverjin Magnus Kihlstedt haraftur-ímóti.

### Lillestrøm var vónbrot

Lillestrøm verður roknað sum stóri avbjóðarin hjá Molde. Hóskvøldið hevði Lillestrøm vitjan av Moss. Úrslitið var 1–1, og tað verður ikki hildið at vera eitt gott úrslit hjá Lillestrøm. Eftir dystin ásannaði Jan Åge Fjørtoft – ein av álopsmonnunum hjá Lillestrøm – at brotssparkið, sum varð dømt til hansara ikki hevði nakað við brotsspark at gera. Hann filmaði seg til tað, segði hann sjálvur.

Bodø/Glimt hevur verið sera sannførandi í fyrstu umførunum. Mikukvøldið vóru teir í Skien og spældu ímóti Odd Greenland. Aftur hesa ferð gekk undan hjá Bodø, sum fór norður aftur við 3–2 sigri.

Viking Stavanger hevur havt ilt við at standa seg í fyrstu umførunum. Men hesa ferð gekk væl. Ímóti Vålkerenge, sum hevur fingið nógv burturúr fyrstu dystunum, vann Viking á heimavølli 4–1.

Lyn hevði heimavøll ímóti Start úr Kristiansand. Heimaliðið vann tepran 1–0 sigur. Sogndal er niðast. Teir hava bara tvey stig. Hesa ferð spældu teir ikki. Dysturin á heimavølli ímóti Bryne var útsettur.

Tað verður spælt aftur í Noregi í morgin. Tá skal Molde spæla á útivølli ímóti Bryne.



Búskapur og vinna:

## Keypa heldur føroyskan laks enn norskan

Nógvir laksakeyparar í ES-londunum eru givnir at keypa laks úr Noregi. Orsøkin er tann einfalda, at innflytararnir bera ótta fyri at fáa rokning fyri revsitoll, um teir norsku útflytararnir ikki halda avtaluna um minstaprís.

Jens Tellefsen hjá Dansk Fisk sigur við norska blaðið Aftenposten, at tað er alt ov hættisligt at keypa norskan laks. Sjálvur hevur hann goldið revsitoll, tí norskir útflytarar, sum hann hevði keypt laks frá, høvdu brotið regluna um minstaprís. Dansk Fisk er ein felagsskapur av fleiri laksavirkjum, hvørs umsetningur liggur um smáar seks mia. krónur um árið. Jens Tellefsen vísir á, at revsitollurin er 14 prosent, og skulu virkini eisini rinda hann, er lítil handil í at keypa norskan laks.

Jens Tellefsen sigur við Aftenposten, at donsku virkini tí heldur keypa laksin úr Føroyum, Írlandi og Skotlandi. Nakað kemur framvegis er úr Noregi.

Norsku laksaútflytararnir hava bundið seg til, at minstaprísurin á laksi skal vera 3,25 evrur fyri kilo. Verður prísurin ikki hildin, kemur revsitollur omaná. Tann 14. mars setti ES eina serliga innflutningsskráseting í gildi, sum m. a. ber í sær, at danska tollverkið skal skráseta allan laksainnflutning úr Noregi. Kemur tollvaldið eftir, at minstaprísreglan er brotin, verða bæði tann norski útflytarin og tann danski innflytarin revsaðir. Skrásetingin hjá ES er fyribils galdandi í tríggjar mánaðir.

Enn er eingin danskur laksainnflytari revsaður eftir nýggju regluni. Hetta kemst av, at brot á reglurnar skulu kannast í Noregi, og enn eru ongan kanningar av hesum slagnum lidnar.

UTTAN ÚR HEIMI

# Stríðið um Føðikirkjuna loyst

**Teir 124 palestinararnir, sum hava hildið til í Føðikirkjuni í Betlehem í meiri enn fimm vikur, eru nú farnir haðani**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*



*Ísraelskir hermenn kanna ein av teimum 124 palestinunum, sum komu út úr Føðikirkjuni gjáramorgunin*

Gjáramorgunin eydnaðist loksins at loysa trætuna um teir seinastu palestinararnar, sum hava fjalt seg í Føðikirkjuni í Betlehem, síðani ísraelski herurin hersetti býin tann 2. apríl.

Í lýsingini komu fleiri bussar til kirkjuna, og stutt eftir vórðu 124 palestinskir menn fluttir úr kirkjuni í bussarnar. Uttanfyri stóðu ísraelskir hermenn á varðhaldi, og allir palestinararnir vórðu kannaðir væl og virðiliga, áðrenn teir sluppu í bussarnar.

Ísraelsku myndugleikarnir kravdu, at trettan av palestinsunum skuldu av landinum, tí teir hava verið uppi í yvirgangsatsóknum. Upprunaliga var ætlanin, at menninir skuldu flytast til Italia, men italsku myndugleikarnir sýttu fyri at taka ímóti øllum trettan. Málið endaði tí í Bruxelles, og har varð avgjørt, at menninir í fyrsta umfari skuldu flytast til Kypros. Haðani skulu nakrir til Italia, aðrir til Spania og onnur evropeisk lond, og Kanada hevur eisini játtað at taka ímóti onkrum teirra.

26 av teimum 124 palestinunum, sum komu út úr Føðikirkjuni í gjár, vórðu settir í palestinsk fongsul. Tey seinastu 85 vístu seg at vera sivilfólk og vórðu latin leys beinanvegin.

Samstundis sum palestinararnir á Vestara áarbakka í gjár fegnaðust um, at stríðið um Føðikirkjuna var loyst, fyrireikaðu palestinararnir í Gaza-geiranum seg til eitt ísraelskt stórálop. Ísraelska stjórnin hevur boðað frá, at hon fer at hevna sjálvmorðsbumbuatsóknina, sum drap 15 ísraelsmenn týskvøldið, og hósdagin boðsendi herleiðslan eykahermonnunum.

Ísraelskir talsmenn søgdu í gjár, at herurin fer at leita eftir yvirgangsmonnum og at taka teir. Einki varð sagt um, nær átakið skuldi byrja.

# Sjúkrasystir beindi fyri 14 sjúklingum

**Niðurlendsku myndugleikarnir hava ákært eina kanadiska sjúkrasystir fyri at hava beint fyri 14 sjúklingum á fýra sjúkrahúsum í Niðurlondum**

NIÐURLOND
*Árni Joensen*

Mikudagin gjørdu myndugleikarnir í Niðurlondum av at ákæra ta 40 ára gomlu Lucy Isabellu Quirina de Berk fyri at hava beint fyri 14 sjúklingum. Sambært ákæruritinum var tann yngsti sjúklingurin eitt fimm mánaðar gamalt smábarn, og tann elsti var ein 91 ára gomul kvinna.

Sjálv hevur sjúkrasystirin víst ákæruni aftur. Hon hevur sitið í fongsli síðani í desember í fjør. Fyri tveimum mánaðum síðani avgjørdi ein dómstólur, at hon skal verða sitandi í fongslinum, og tann 17. juni byrjar rættarmálið ímóti henni.

Niðurlendsku myndugleikarnir hava í sambandi við málið kannað líkini av trimum av teimum 14 sjúklingunum, og í niðurstøðuni siga myndugleikarnir seg hava staðfest, at talan var um beinleiðis dráp og ikki samvitskudráp.

Árini frá 1995 til 2001 arbeiddi tann kanadiska sjúkrasystirin á fýra ymsum sjúkrahúsum í Niðurlondum. Hon byrjaði á einum sjúkrahúsi í Scheveningen og arbeiddi seinni á trimum sjúkrahúsum í Haag. Sambært niðurlendska ákæruvaldinum beindi hon fyri tí fyrsta sjúklinginum í 1997.

Ákæruvaldið vil vera við, at Lucy Isabella Quirina de Berk hevur fleiri ferðir roynt at taka lívið av sær.

Úr Norðurlondum:

## Vænta algur

Finsku umhvørvismyndugleikarnir bera ótta fyri, at eitrandi algur fara at gera um seg í einum stórum parti av Eystrasalti í summar. Ávaringin kemur, eftir at havrannsóknarstovan í Helsingfors hevur tikið royndir av sjónum á 360 ymsum støðum kring alt Eystrasalt.

Finsku myndugleikarnir siga, at talan er um algur av slagnum aphanizomenon og nodularia, sum kunnu vera vandamiklar fyri bæði djór og fólk. Algurnar gera eitt serligt eitur, sum kann skaða livrina.

Donsku umhvørvismyndugleikarnir eru eisini á varðhaldi. Haðani verður sagt, at vandin fyri eitrandi algum í summar er serliga stórur í Finsku Víkini og á havleiðini millum Gotland, Øland og Bornholm.

## Doyggja av heilivági

Norsku heilsumyndugleikarnir siga í einari nýggjari frágreiðing, at 108 norðmenn doyðu í fjør av hjáárini av ymsum heilivági. Tað er næstan tíggju prosent meiri enn í fyrraárið.

Samstundis sigur frágreiðingin, at heilsumyndugleikarnir fingu 26 prosent fleiri fráboðanir um hjáárin av heilivági í fjør enn í 2000. Tilburðirnir vóru 1248 í tali. Hagtølini benda á, at tað eru serliga fólk í aldrinum millum 40 og 80 ár, sum fáa ymisk hjáárin av heilivági.

## Flogfar datt niður

Tvey fólk doyðu, tá eitt lítið flogfar datt niður tætt við floghavnina í Sandane í Sogn og Fjordane í Noregi hóskvøldið. Flogfarið datt niður í sjógvin, men tað eydnaðist bjargingarmonnum at fáa tey bæði líkini í land. Maðurin, sum átti flogfarið, hevði sjálvur bygt tað.